Nýggjárs-kappingin hjá FBS

Týskvøldið 29. desember skipaði FBS fyri nýggjárs-kapping í Bridgehúsinum. 19 pør møttu upp. Spæld varð ein swiss pairs parakapping við barometri, har gjørt varð upp sum multihold, t.v.s. at latin vórðu IMP fyri hvørt spælið. Í einari slíkari parakapping hava yvirstingirnir minni týdning enn í einari vanligari parakapping. Heðin Mouritsen og Rói á Røgvu Joensen skipaðu fyri kappingini, og hetta greiddu teir væl. Umframt bronsustig til seks tey fremstu pørini vórðu eisini latnir nógvir vinningar (sjampanja og fýrverkari) bæði undir og eftir kappingina.

Úrslitið

1. Bogi Simonsen - Arne Mikkelsen	63
2. Hans J. Petersen - Arnbjørn Sivertsen	56
3. Eyðun Jensen - Eyðun Joensen	34
4. Bjarni Johansen - Kjartan Johansen	31
5. Salomon Johansen - Sakaris Joensen	22
6. Allan Dal-Christiansen - Finnbjørn Olsen	16
7. Marjun Restorff - Arnleyg Mikkelsen	7
8. Hallberg Arnfríðsson - Carl Mikkelsen	4
Gunnar Mouritsen - Høgni Vesturklett	4
10. Símin Lassaberg - Árant Berjastein	3
11. Hallgerð Hansen - Asla Weihe	-2
12. Høgni Jacobsen - Finn Ougaard	-6
13. Steingrím Weihe - Hanus Bærentsen	-8
14. Mortan Rasmussen - Asvør Djurhuus	-10
15. Jens Pauli Nolsøe - Kaj Alstrup	-13
16. Henning Eysturoy - Martha Hansen	-28
17. Ingi Jacobsen - Ann Thomsen	-36
18. Steinbjørn Zachariasen - Heðin Mortensen	-50
19. Danny Danielsen - Laila Danielsen	-61

Tvey spøl frá kappingini

Vit skulu fyrst síggja eitt spæl, har Allan Dal-Christiansen meldaði hart men eisini spældi væl.

E/EV

	K83	
	AKJ874	
	A94	
	A	
J10962		AQ5
1065		2
10753		Q862
9		Q6532
	74	
	Q93	
	KJ	
	KJ10874	

V	N	E	S
Asvør	Allan	Mortan	Finnbjørn
-	-	pass	pass
pass	1hj	D	2kl
pass	3hj	pass	4hj
pass	6hj	pass	pass
pass			

Útspælið var kleyvari til essið. Eystur hevði við upplýsingarduplingini víst, at hann hevur øll tey útistandandi harrastigini. Tí sá Allan beinanvegin, at tað ikki loysti seg at spæla spaðara til kongin. Í staðin spældi hann rútara til dreingin, tók rúK og spældi seg á hondina við at trumfa ein kleyvara. Tók rúA og kastaði spaðara á borðinum. Nú kundi hann trumfa tveir spaðarar á borðinum. Allan og Finnbjørn vóru teir einastu, sum meldaðu slemm í hesum spælinum og fingu sjálvsagt ein topp.

Hetta seinna spælið kom í tí síðsta umfarinum, og gjørdist rættiliga avgerandi fyri tey bæði fremstu pørini á 1. borði.

V/NS

	1063	
	98753	
	82	
	K43	
AKQ82		975
K		AQ42
AQJ95		764
95		A86
	J4	
	J106	
	K103	
	QJ1073	

V	N	E	S
Arnbjørn	Bogi	Hans J.	Arne
1sp	pass	2kl	pass
3rú	pass	3sp	pass
4sp	pass	pass	pass

Vestur hevði hug at melda slemm, men tá hann ivaðist í, hvussu sterkur makkarin var, fall hann í fátt og meldaði bara útgang. Við 2kl hevur makkarin longu lovað 10+hp, og avtalan sum Vestur hevði gloymt var, at 3sp hjá makkaranum í hesum førinum vísti størri áhuga fyri slemmi, enn um hann hevði meldað 4sp.

Útspælið var hjartari, sum Vestur læt ganga til kongin. Hann tók síðan trumf, fór inn á borðið í kleyvara, kastaði kl9 uppá hjA og rú5 uppá hjQ. Rútara til dreingin og rúA. Suður fekk fyri rúK.

Vestur ikki bara meldaði illa í hesum spælinum, hann spældi eisini illa. Hann skal taka útspælið við hjA, klípa í rútara, taka trumf, fara aftur á borðið í kleyvara, kasta kl9 uppá hjQ og klípa enn eina ferð í rútara - 13 stingir! Spælið gav NS +3 og EV -3 á barometrinum. Um EV meldaðu slemmin, høvdu teir fingið +8 (NS -8) og vunnið kappingina.

Einans tvey pør meldaðu lítlaslemm í hesum spælinum. Tey vóru Mortan Rasmussen - Ásvør Djurhuus og Allan Dal-Christiansen - Finnbjørn Olsen.

FBS

Oljukanningarnar við Føroyar gjørdar upp

Sum nakað nýtt hevur Vaktar- og Bjargingartænastan fest á blað allar tær seismisku spreingingarnar, sum blivu gjørdar í føroyskum sjógvi í fjør. Úrslitið vísir, at serliga tvey øki ella kassar hava stóran áhuga hjá oljukanningarfeløgunum

LEIF LAADAL

Fyri at kanna um olja er í føroysku undirgrundini, er neyðugt við seismiskum spreingingum. Hesar verða gjørdar á tann hátt, at eitt seismikk-skip siglir aftur og fram á grunnunum og úti á havi við størari tekniskari útgerð hangandi í veirum aftur úr sær. Í útgerðini sita festar nakrar seismikk-kanonir, sum skjóta radiobylgjur niður ígjøgnum havbotnin. Bylgjurnar verða síðani fangaðar inn aftur í stórar teldur, sum so kunnu rokna seg fram til, hvat tað er, sum goymir seg í undirgrundini. Nakað soleiðis gongur tað fyri seg, sjálvt um serfrøðingar innan oljutøkni óivað høvdu flent ella ypt øksl at hesi forklaring.

Fyri at fáa loyvi at kanna føroyska havbotnin við seismikki, er neyðugt hjá kanningarskipunum at hava ein føroyskan eygleiðara umborð ella eitt fiskivinnuumboð, sum Vaktar- og Bjargingartænastan velur at ropa hesi fólk. Øll tey skip, sum hava skotið seismikk innan fyri føroyska sokkulin í fjør høvdu føroysk umboð umborð, og hesi hava so dagliga sent upplýsingar til Djóna Weihe á skrivstovuni hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni. Hann hevur sett tølini saman, og vísa tey, at skipini samlað hava skotið seismikk í góðar 1425 tímar.

Serliga tveir kassar

Tá ið arbeitt verður við oljuleiting ella boring, verða økini deild upp í kassar ella »grids«. Rættindi at leita og bora eftir olju í hesum kassum verða síðani útleigað. Økið rundan um Føroyar er deilt í einar 70 kassar, men tað eru serliga einir 10 kassar á økinum millum Føroyar og Bretland, sum oljufeløgini eru áhugað í. Enn eru økini ikki boðin út til sjálva oljuboring, og sjálvt um seismiskar kanningar vórðu gjørdar í 21 kassum í fjør, so vórðu fleiri enn 1000 tímar av teimum 1425 skotnir í tveimum kassum í ein landsynning úr Suðuroynni. Ein kassi eystur úr Suðuroyarbanka telur 738,2 tímar.

Nøkur feløg hava enn nakar mánaðir eftir, har tey skulu skjóta seismikk, men tað tykist, sum feløgini bíða eftir, at ein loysn skal finnast á marknatrætuni millum Føroyar og Bretland.

Tað er krav frá føroyskari síðu, at tey skip, sum skjóta seismikk innan fyri føroyska sokkulin, skulu hava fiskiveiðuumboð umborð, men er talan um seismiskar kanningar í tí sonevndu hvítu sonuni, so er ikki neyðugt við føroyskum umboðum. Tá ið Føroyar og Bretland hava fingið skil á markinum, vil tað tó verða krav, at allar kanningar við Føroyar skulu gerast við føroyskum eygleiðarum umborð - eisini tær í hvítu sonuni.



Sjálvt um seismiskar kanningar vórðu gjørdar í 21 kassum í fjør, so vórðu fleiri enn 1000 tímar av teimum 1425 skotnir í tveimum kassum í ein landsynning úr Suðuroynni. Ein kassi eystur úr Suðuroyarbanka telur 738,2 tímar

Útlendsk veiða frá 01-01-1998 til 31-12-1998

Fiskaslag/Tjóð	Háland	Danmark	Bretland	Týskland	Frakland	ES tilsamans	Noreg	Russland	Estland	Letland	Litauen	Ísland	Onnur lond tilsamans
Toskur	0	0	326,1	0	0	326,1	533,6	0	0	0	0	0	533,6
Hýsa	0	0	133,6	0	0,1	133,7	165,8	0	0	0	0	0	165,8
Upsi	0	0	367,7	0	1,7	369,4	53,7	0	0	0	0	0	53,7
Longa	0	0	175	0	0,3	175,3	2704,3	0	0	0	0	0	2704,3
Blálonga	0	0	0,5	0	618,6	619,1	54,8	0	0	0	0	0	54,8
Brosma	0	0	36,5	0	1,5	38	1481,6	0	0	0	0	0	1481,6
Kongafiskur	0	0	25,2	0	52,3	77,5	22,7	0,6	0	0	0	0	23,3
Kalvi	0	0	2,2	0	1,5	3,7	38,1	0	0	0	0	0	38,1
Svartkalvi	0	0	17,4	0	0,8	18,2	105,3	0	0	0	0	0	105,3
Havtaska	0	0	112,7	0	0,7	113,4	0,7	0	0	0	0	0	0,7
Svartkjaftur	7,1	860	12449,2	0	302,7	13619	37325	92970,6	2794,2	0	0	7008,9	140098,7
Sild	0	865	1505	0	0	2370	1260	5485,3	0	0	0	64350	71095,3
Makrelur	0	3005	0	0	0	3005	0	19460,3	1455,5	0	0	0	20915,8
Rossamakrelur	0	0	0	0	0	0	0	2,1	0	0	0	0	2,1
Gullaksur	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Langasporl	0	0	0	0	713,6	713,6	0	0	0	0	0	0	0
Stinglaksur	0	0	0	0	74,4	74,4	0	0	0	0	0	0	0
Brugdulivur	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Annað	0	0	81,1	0	424	505,1	46,4	159,4	0	0	0	0	205,8
Tilsamans	7,1	4730	15232,2	0	2192,2	22161,5	43792	118078,3	4249,7	0	0	71358,9	237478,9
Fiskidagar	5	86	536	0	366	993	1588	2557	217	0	0	692	5054

Samlað veiða	
Toskur	859,7
Hýsa	299,5
Upsi	423,1
Longa	2879,6
Blálonga	673,9
Brosma	1519,6
Kongafiskur	100,8
Kalvi	41,8
Svartkalvi	123,5
Havtaska	114,1
Svartkjaftur	153717,7
Sild	73465,3
Makrelur	23920,8
Rossamakrelur	2,1
Gullaksur	0
Langasporl	713,6
Stinglaksur	74,4
Brugdulivur	0
Annað	710,9
Tilsamans	259640,4
Fiskidagar	6047

Veiða hjá útlendskum fiskiførum tilsamans 259640,4 tons

Svartkjafturin nógv tann størsti veiðubólkurin

Aftur í fjør var svartkjafturin tann størsti einstaki veiðubólkur, sum bleiv veiddur undir Føroyum. Gott 153.000 tons av veiddum svartkjafti eru skrásett hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni, og fiskaðu russar meginpartin

LEIF LAADAL

Uppgerðin av útlendskari veiðu undir Føroyum er nú gjørd upp. Í 1998 veiddu útlendingar 259.640,4 tons umframt gott 10.000 tons, sum vórðu veidd sum handilsveiða og 174 tons av royndarveiðu eftir tunfiski.

Russar eru enn teir, sum veiða mest í nøgd undir Føroyum. Í fjør bleiv tað til 118.078,3 tons av svartkjafti, sild og makreli og eitt sindur av kongafiski. Í hesum tali goymir seg eisini 159 tons av hjáveiðu.

Íslendingar fiskaðu 71.358,9 tons undir Føroyum í fjør, og vóru heili 64.350 tons sild. Hini gott 7000 tonsini vóru svartkjaftur.

Triðjastørsta fiskitjóð við Føroyar í fjør var Noregi. Norðmenn fiskaðu 43.792 tons av nærum øllum teimum vanligu fiskasløgunum við Føroyar. Tó taldi svartkjafturin 37.325 tons.

ES-londini fiskaðu 22.161,5 tons samlað, meðan londini, sum ikki eru í ES, áttu 237.478,9 tons.

Handilsveiðan, sum ikki verður tald við í omanfyri nevndu tølum, var 6.704,4 tons til Russlands og 3.472,9 tons til Estlands. Japanarar royndarveiddu tey 173,9 tonsini av tuni.

ALTERNA
– tað er
- Góð undirvísing
- Nógvar góðar vinir
- Góður felagsskapur
- Suverenur túrur til Ísrael

- sigur Rutt Dam, Suðurstíggjur 8, 160 Argir

Møt Rutt og fyristøðumanni Poul Kirk, Alterna, Danmark í:

Filadelfia Tórshavn:
- friggjadagin 8.1.99 kl. 21.00 (Ungdómsmøti)
- leygardagin 9.1.99 kl. 15.00 (serligt Info-møti fyri áhugað í Alterna)
- sunnudagin 10.1.99 kl. 11.00 (Gudstænasta)

Evangeliihúsið Tórshavn:
- sunnudagin 10.1.99 kl. 18

Soli Deo Gloria Klaksvík:
- leygardagin 9.1.99 kl. 21.00 (møti)

ALTERNA
Frydensbergvej 25
9550 Mariager, Danmark
http://home5.inet.tele.dk/Alterna
E-mail: alterna@post5.tele.dk

SKEIÐ
Nýtt skeiðhøll á Tórshavnar Sjómansheimi

í VIT-stovuni
januar 1999

MS Windows *grundskeið* **13/1 kl: 09 - 13**	Lær m.a. at skipa tíni data og fortit við mappum og snarvegum.
MS Access *grundskeið* **14/1 kl. 09 - 16**	Lær Access at kenna og royn, hvussu tað kann nýtast í dagliga arbeiðinum.
MS Word *fyri skrivstovufólk I* **19/1 kl: 09 - 16**	Lær at stovna og handfara skabelónir. Lær at "flætta" data í brøv og etikettir.
INTERNET I *grundskeið* **20/1 kl. 13 - 17**	Lær hvat Internet er og hvussu tú nýtir "browsara" og teldupost-skipan.
MS PowerPoint *grundskeið* **21/1 kl. 09 - 13**	Lær hvat PowerPoint er og hvussu tú framleiðir glærur o.a. - skjótt og væl.
INTERNET II *framhalds-skeið* **27/1 kl. 13 - 17**	Lær meira um at ferðast á Internetinum. Um leitimaskinur, chat o.a.
MS Access *framhalds-skeið* **28/1 kl. 09 - 16**	Lær database-"design". - ætlan og framleiðsla. (krevur grundskeið)

Tilmelding á telefon: 319914 ella 219921

KT-tænasta • Forritan • Skeið
Gríms Kambansgøta 7 • 100 Tórshavn
Telefon 319914 • Telefax 318351
www.vit.fo • fdj@vit.fo